# Tríggjar milliónir blivu til 300 milliónir upp á trý ár

**Sandoy Seafood í Sandoynni, hevur seinasta hálvtfjórða árið goldið 60 milliónir í lønum. Hetta er alt úrslit av, at landsstýrið setti tríggjar milliónir í Sandoyarætlanina í 1997**

ØKISMENNING
*Áki Bertholdsen*

Viðhvørt loysir tað seg hjá at lata almennan stuðul í vinnulívið.

Tað er Sandoy Seafood í Sandoynni besta prógvið um.

Í 1997 setti landskassin tríggjar milliónir av til eina Sandoyarætlan, sum tað varð nevnt.

Sama árið blivu hesar tríggjar milliónirnar brúktar til at lata flakavirkini í Skopun og á Sandi uppaftur við.

Tað var Delta Seafood á Tvøroyri, ið saman við øðrum, stovnaði Sandoy Seafood, sum síðani fekk virksemið ígongd aftur á teimum báðum flakavirkinum.

Síðani Sandoy Seafood fór undir virksemið í Sandoynni fyri hálvumfjórða ári síðani, hevur felagið havt ein umsetning uppá 100 milliónir um árið, ella yvir 300 milliónir tilsamans.

Tað eru eini 130 ársverk á teimum báðum virkjunum í Skopun og heima á Sandi, og tilsamans eru yvir 60 milliónir goldnar í lønum í lønum. Harafturat kemur alt tað avleiddað virksemið, sum hetta kastar av sær.

Marner Lisberg, nevndarformaður í Sandoy Seafood, sigur, at sostatt eru tær tríggjar milliónirnar, sum tað almenna brúkti í stuðuli til Sandoyarætlanina í 1997, longu blivnar til 300 milliónir.

– So kann ein og hvør gera sær sína meting av, hvønn týdning hetta hevur havt fyri Sandoynna – og fyri landskassan, tí hasar tríggjar milliónirnar eru komnar fleiri ferðir aftur í landskassan í skatti og avgjøldum av ymsum slag, umframt í spardum útgjaldum úr ALS.




*– Tað er alt, sum talar fyri, at tá ið nýggja sandoyarferjan kemur í sigling, fer tað at føra økt virksemið við sær á teimum báðum flakavirkjunum í Sandoynni, sigur Marner Lisberg, nevndarformaður í Sandoy Seafood*

## Hentur Stuðul

Sandoy Seafood er eitt dóttirfelag hjá Delta Seafood á Tvøroyri.

Delta Seafood á Tvøroyri varð stovnað í 1995 .

– Tíðliga í 1997 fóru vit at kanna møguleikarnar fyri at víðka um virksemið. Vit høvdu fólkið til at víðka virksemið við. Men á Tvøroyri vóru karmarnir í trengra lagi. So tað var eyðsæð, at ein máti at koma víðari uppá, var at kanna møguleikarnar aðrastaðni í landinum.

– Og tað var rættiliga skjótt, at eyguni fullu á Sandoynna.

– Kreppan hevði rakt Sandoynna ógvuliga meint og arbeiðsloysið var eitt tað størsta í landinum. Har vóru eisini tvey virki, sum vit hildu, kundu brúkast til tey fiskivinnuendamál, vit høvdu í tonkunum, sigur Marner Lisberg.

Hann heldur eisini, at Sandoyggin er sera áhugaverd í fiskivinnuhøpi.

– Tað er onki sum bendir á, at Sandoyingar tráað nakað serligt eftir at sleppa upp í oljuvinnuna. Tvs, at tað er onki at ivast í, at tær menniskjansligar og fíggjarligar kreftir, sum eru í oynni, heldur fara at leggja seg eftir at royna at menna fiskivinnuna og tað, sum oyggin eisini er kend fyri, nevniliga landbúnaðin.

– Tí fara fiskivinnan og landbúnaður helst at verða høvuðsvinnunar í oynni, eisini í framtíðini.

– Áður vóru fleiri royndir gjørdar at lata virkini uppaftur, men alt varð miseydnað. Fiskavirking átti bæði virkini, men fekk ikki lív í tey aftur og tey endaðu sostatt í tí tiltikna mølposanum hjá Fiskavirking, sum Føroya Banki síðani yvirtók.

– Úrslitið bleiv, at landsstýrið setti tríggjar milliónir av í eina Sandoyarætlan í eini roynd at fáa virksemi í oynni á føtur aftur.

Tað vóru fyrst og fremst løgtingsmenninir Jógvan Adolf Johannesen og John Petersen, landsstýrismaður í fiskivinnumálum, sum vóru forsprákarar fyri at seta almennan stuðul í Sandoyarætlanina og sum løgdu stóra orku í at fremja ætlanina.

Endin varð, at felagið Sandoy Seafood varð stovnað á sumri í 1997.

– Tað vóru Delta Seafood á Tvøroyri, Havnar Timburhandil, Arbeiðsmannafelagið og Arbeiðskvinnufelagið í Skopun og Vinnugrunnurin á Sandi, sum Sands Arbeiðarafelag eisini er uppi í, sum stovnaðu Sandoy Seafood.

## Partapeningurin var tvær milliónir.

– Men vit gjørdust skjótt greið yvir, at hetta var ov lítið til at lata virkini í oynni uppaftur við, tí nú virkini høvdu staðið still so leingi, var nógv at gera við tey, áðrenn tey kundu brúkast aftur. Tað var eisini neyðugt at keypa nakað av nýggjari útgerð.

– Tí søktu vit um at fáa tær tríggjar milliónirnar, sum vóru settar av til Sandoyarætlanina og tær vórðu so eisini settar í ætlanina.

## Tung byrjan

Nevndarformaðurin í Sandoy Seafood sigur, at teir mettu, at tær tríggjar milliónirnar vóru nóg mikið til neyðugu útgerðina og til at gera virkini í stand aftur fyri. Ætlanin var so at brúka tær báðar milliónirnar, sum vórðu settar í felagið í partapengum, til rakstrarfígging, saman við aðrari rakstrarfígging frá Bankanum.

–Avtalað varð gjørd við Føroya Banka um at leiga flakavirkini í Skopun og á Sandi. Men, tá vit lótu upp í september í 1997, høvdu vit brúkt 5,8 milliónir. Sostatt høvdu vit brúkt allan partapeningin, allan tann almenna stuðulin, umframt 800.000 krónur av rakstrarkredittinum frá Bankanum.

– Av tí sama var byrjanin nógv tyngri, enn roknað var við.

Marner Lisberg sigur, at tí er tað ongin ivi um, at virkini í Sandoynni høvdu aldrin komið ígongd aftur, hevði landskassin ikki latið tær tríggjar milliónirnar í stuðuli.

Síðani hevur rættiliga nógv virksemi verið á teimum báðum virkjunum í Sandoynni.

– Virksemið er skipað so, at virkið Heima á Sandi er saltfiskavirkið burturav, og har verða skipini eisini landað. Hinvegin verður feskt og fryst arbeitt í Skopun.

– Tilsamans eru eini 23.000 tons av fiski virkað á teimum báðum virkjunum hjá Sandoy Seafood hesa tíðina, tað hevur havt virkini opin.

Síðani er eisini tað hent, at DeltaSeafood keypt partabrøvini hjá Havnar Timburhandil, so at tað nú eru fýra partaeigarar eftir í Sandoy Seafood: Teir eru Delta Seafood, Arbeiðsmanna- og arbeiðskvinnufelagið í Skopun og Vinnugrunnurin á Sandi.

## Fyrimyndarligt samstarv í allar ættir

Marner Lisberg sigur, at hesa tíðina, teir hava verið í Sandoynni, hevur samstarvið við allar partar verið fyrimyndarligt og fólkið í oynni hevur bakkað felagið 100% upp. Somuleiðis hevur samstarvið ímillum tær báðar bygdinar, Skopun og Sand, verið fyrimyndarligt.

– Men fyri at fáa lønandi fiskivinnu, krevjast eisini, at vit hava dugnaligar fiskaseljarar. Og vit hava eisini havt sera gott samstarv við tey bæði feløgini, sum selja mesta partin av fiskinum fyri okkum, Farex og Fiskasøluna. Vit hava somuleiðis havt eitt gott samstarv við Føroya Banka, sum framvegis eigur virkini.

– Tað mesta, vit hava keypt av fiski, hava vit keypt frá skipum og bátum úr Sandoynni og samskiftið tann vegin i hevur eisini gingið væl.

– Og ikki at gloyma, hava vit havt eitt sera gott samstarv við Strandferðsluna. Eini 30% av fiskinum, vit arbeiða, keypa vit á uppboðssøluni og fiskurin, vit selja, skal førast til Sandoynna.

–Flutningstólið, sum Strandferðslan hevur at røkja Sandoynna við, er Tróndur, og hann er bæði gamal og sera ótíðarhóskandi, og lýkur ikki krøvini, sum verður settur til nútímans fiskaflutning.

– Men Strandferðslan hevur gjørt sær sera stóran ómak fyri at veita okkum eina so trygga tænastu, sum gjørligt. Hon hevur verið ein sera týdningarmikil samstarvsfelagið fyri at tað skal bera til at hava virksemi í Sandoynni yvirhøvur. Og tað er onki at ivast í, at tað verður eitt stórt framstig, tá ið nýggja sandoyarferjan fer at sigla nú í vár.

– Tá kann eisini væntast, at vit fara at keypa meiri fisk á uppboðssøluni, umframt tað, vit keypa frá skipunum í oynni. Tí talar alt fyri, at tað nýggja sandoyarskipið fer at føra økt virksemið við sær á teimum báðum virkjunum í oynni, sigur Marner Lisberg.

## Ein stórur dreymur

Nevndarformaðurin í Sandoy Seafood sigur, at hansara stóri dreymur er, at tað einaferð kemur so langt, at tað fer at bera til at løna teimum, sum dagliga arbeiða á virkinum, betri umstøður at arbeiða undir. Eitt nú vónar hann, at virkini einaferð fara at kasta so frægt av sær, at tað fer at bera til at luta ein part av yvirskotinum út til arbeiðsfólkið.

– Vit hoyra dag og dagliga um, hvussu væl tað gongur í samfelagnum. Men eg haldi ikki at tey, sum arbeiða á flakavirkjunum, merkja so nógv til hendan framburðin, sigur Marner Lisberg.



# Sandoy Seafood: Eitt fiskavirki á vegamóti

**Partapeningurin í Sandoy Seafood á Sandi er nú hækkaður eina millión krónur. Orsøkin er ikki, at felagið er í trupulleikum. Men eigararnir vilja hava størri rásarrúm. Samstundis verður arbeitt fyri at víðka virksemið**

VINNULÍV
*Áki Bertholdsen*

Síðani tvøramenn stovnaðu fiskavirkið Delta Seafood fyri seks árum síðani, hevur fyritøkan verið í stórari og støðugari menning.

Eitt stórt lop framá gjørdi felagið, tá ið tað, saman við øðrum, stovnaði Sandoy Seafood í Sandoynni.

Sum tað sæst á grein aðrastaðni í blaðnum, er virksemið hjá Sandoy Seafood nú komið í eina fasta legu, hóast byrjanin var væl dýrari enn ætlað.

Tó eydnaðist árið í fjør ikki so væl, sum ætlað, serliga teir fyrstu mánaðirnir. Virkið hevði tó eitt yvirskot í fjør upp á 500.000 krónur, aftaná avskrivingar.

Men Marner Lisberg, nevndarformaður í Sandoy Seafood, sigur, at gongdin higartil í ár bendir á, at hetta árið fer at roynast væl frægari.



*– Nógv arbeiði hevur verið á teimum báðum virkjunum í Sandoynni. Føroya Banki eigur framvegis virkini, og nú verður samráðst um eina nýggja leigiavtalu. Men Sandoy Seafood er eisini áhugað í at keypa tey bæði virkini í Skopun og Heima á Sand, og Bankin er áhugaður í at selja*

## Hækkað partapening

Nevndarformaðurin dylir ikki fyri, at teir hava verið fegnir um at teir hava verið við til lagt lunnar undir eina vinnuliga menning í Sandoynna.

– Tað kemst sjálvandi ikki minst av, at oyggjarfólkið hevur tikið fult undir við teimum ætlanum, vit hava havt.

Og hann sigur, at nú verða lunnarnir lagdir undir framtíðina hjá delagnum.

– Avtalan við Føroya Banka um at leiga virkini í Skopun og á Sandi, gongur út 1. januar í 2002.

– Tí má sigast, at vit standa á einum vegamótið í løtuni. Men tað skerst ikki burtur, at vit eru fremmandir í oynni og spurningurin um, hvat vit gera, er framvegis treytaður av, um undirtøka er fyri, at vit halda fram.

– Men vit hava fingið at vita, at tað er full undirtøka fyri, at hildið verður fram við samstarvinum ímillum okkum og sandoyingar.

– Tá vit fóru undir Sandoy Seafood, var tað ein roynd. Men vit eru nøgdir við gongdina og eru sinnaðir at halda fram. Enn hevur hetta ikki kastað nakað av peningi av sær til íleggjararnar, men vit eru sannførdir um, at tað fer tað at gera sum frálíður.

– Fyrsta stigið var at hækka partapeningin í felagnum. Tað er nú gjørt við tað, at teir fýra partaeigararnir, Delta Seafood, Vinnugrunnurin á Sandi og tey bæði arbeiðarafeløgini í Skopun, hava sett 250.000 krónur í virkið afturat í part. Sostatt er partapeningurin hækkaður eina millión.

## Ætla at keypa virkini

Marner Lisberg sigur, at kappingin í fiskivinnuni er sera hørð og ein orsøk til at hækka partapeningin er fyri at hava eitt tryggari fíggjarligt grundarlag undir virkjunum.

– Somuleiðis eru vit í samráðingum við Føroya Banka um at leiga virkini longri.

– Men báðir partar eru áhugaðir fyri, at vit keypa virkini. Tí ynskja vit, at ein nýggj leiguavtala verður orðað við keypi fyri eyga.

Marner Lisberg sigur, at slíkt stig høvdu teir ikki tikið, vóru teir ikki sannførdir um, at tað er ein framtíð í tí.

– Og sjálvandi er tað altíð neyðugt at vit fylgja við og at menna okkum alla tíðina. Hann vísir á, at nýliga er eitt áhugavert fiskavirki komið í Skálavík og hann sigur, at í framtíðini fer samstarv at vera ímillum virkið í Skálavík og Sandoy Seafood.

– Ein møguleiki er at vit kunnu levera virkinum í Skálavík rávøru, sum tað so kann arbeiða víðari. Ein annar møguleiki er, at Sandoy Seafood sleppur inn á virkið á Skálavík at hávirka fisk. Allir møguleikar eru opnir, sigur Marner Lisberg.

Samstundis er Delta Samtakið, sum Sandoy Seafood er ein partur av, uppi í ymsum øðrum nýskapandi ætlanum á fiskivinnuøkinum, sum greitt verður frá aðrastaðni.

# Ætla undir aling á Sandi

**Fyri meiri enn einum ári síðani, søkti Sandoy Seafood um loyvi at fara undir aling á Sandsvág. Men enn er onki svar komið**

ØKISMENNING
*Áki Bertholdsen*

Stendur tað til menninar aftanfyri Sandoy Seafood í Sandoynni, verður skjótt farið undir aling í Sandoynni.

Í hvussu so er, er tað meiri enn eitt ár síðani, at Sandoy Seafood søkti Landsstýrið um loyvi at fara undir aling á Sandsvág.

Marner Lisberg, nevndarformaður í Sandoy Seafood, sigur, at teir royna alla tíðina at menna felagið.

– Og alivinnan er eitt ógvuliga áhugavert øki.

Hann heldur, at sleppur felagið undir aling, hevði tað verið ein stórur vinningur fyri tey bæði virkini í Sandoynni, tí so kunnu tey brúkast til at arbeiða laks í, tey tíðarskeiðini, tá ið lítil fiskur er at arbeiða. Og tað kundi ført til nógv størri virksemi á virkjunum í sambandi við kryvjing av laksi ávísar tíðir, o.s.fr.

Men hann vísir eisini á, at tað er væl hugsandi, at samstarv kann takast upp við Lido Seafood í Skálavík, so at alifiskur frá Sandoy Seafood eisini verður virkaður har.



*– Ætlanin er nú at fara undir aling á Sandsvág, men tað dregur út at fáa svar úr Landsstýrinum. Verða sandoyingar útihýstur frá alivinnuni, eiga teir at fáa endurgjald, sigur Marner Lisberg, nevndarformaður í Sandoy Seafood*

## Onki svar

Marner Lisberg sigur, at enn er onki endaligt svar komið frá Landsstýrinum.

– Tað gongur strilti at fáa loyvi frá Landsstýrinum til aling í Sandoynni.

Hann sigur, at orsøkin til at tað gongur so trekt at fáa aliloyvi frá Landsstýrinum, er, at lívfiskastøðin er í Skopun frammanundan.

– Landsstýrið heldur, at verður aling í Sandoynni, kann tað fara at darva virkseminum hjá lívfiskastøðini. Eitt nú verður stúrt fyri, at alingin kann smitta lívfiskastøðina við ymsum sjúkum og tað vildi verið óheppið.

Í hesum sambandi vísir nevndarformaðurin í Sandoy Seafood til nýggju avtaluna, sum er gjørd við ES.

– Eftir henni er tað loyvt at flyta livandi djór til Føroya.

Og hann hann spyr, hvar alifiskurin stendur í hesi avtaluni

– Er tað eisini loyvt at innflyta alifisk, er grundarlagið tikið undan lívfiskastøðini, tí hon varð júst bygd fyri at vit skuldu útvega okkara egna lívfisk

Men Marner Lisberg sigur, at alivinnan er avgjørt tann mest áhugaverda vinnan í løtuni. Tølini fyri alivinnuna tala fyri seg.

– Tað eru ymsar meiningar um smittuvandan við at hava eini alistøð á Sandsvág. Og vit mugu eisini staðfesta, at tað eru alibrúk bæði á Gomlu Rætt og undir Hestoy. Spurningurin er so, um smittuvandin í Skopun er størri frá aling á Sandsvág, enn hann er frá aling undir Hestoy og á Gomlu Rætt.

– Men tað kann í øllum førum ikki vera rætt, at sandoyingar skulu forðast í at fara undir aling, bara tí at tað almenna hevur lagt eina lívfiskastøð í Skopun. Blívur tað niðurstøðan, so at landsstýrið ikki vil geva aliloyvi á Sandsvág, eiga sandoyingar at fáa okkurt slag av endurgjaldi, heldur nevndarformaðurin í Sandoy Seafood.